# Nýtt yrkingasavn argar

**Eitt heldur illfýsið orðaskifti hevur tikið seg upp um eitt nýtt føroyskt yrkingasavn, har ein ummælari ávarar móti at stuðla slíkum fúlum, pedofilum og svínskum lesnaði á føroyskum**

YRKINGASAVN
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*




*Nýggja yrkingasavni hjá Agnari Artúvertin hevur fingið ilt í rithøvundan og tíðindamannin Ólavur í Beiti, sum ávarar móti slíkum svínskum og pedofilum lesnaði*

»Jahve kemur aftur - úr døprum tonkum og svørtum vónloysi« er heitið á nýggjum yrkingasavni hjá Agnari Artúvertin. Saman við savninum hevur yrkjarin sent út eina ávaring móti, at konufólk fáa fatur á útgávuni. Sambært Agnari Artúvertin fara tær nevniliga ikki at tola at lesa óvanliga sterku og bersøgnu yrkingarnar í savninum.

### Pedofilt svínarí

Tann fyrsti at argast inn á savnið var tó eitt mannfólk. Í umrøðu av savninum á Vágaportalinum fær rithøvundurin og tíðindamaðurin Ólavur í Beiti nevniliga vaml av tilsipingunum í yrkingunum til pedofili og blóðskemd. Umrøðuna savnar Ólavur í Beiti undir yvirskriftini »Ein barnalokkari bekennir kulør«

Í aftursvari í Oyggjatíðindum vísir yrkjarin Agnar Artúvertin á, at gamaní kann brotið, sum Ólavur í Beiti sipar til, tulkast pedofilt - men tað merkir ikki tað sama sum at yrkjarin er pedofilur, men harafturímóti at røddin í savninum brúkar pedofili at fáa sín boðskap fram.

Hóast Ólavur í Beiti er tilvitaður um, at sterku orðingarnar kanska eru ein máti hjá yrkjaranum at gerast kendur, kann tað ikki umbera hetta sjúka og skitna søluátakið eftir hansara tykki.

- Sjálvur fari eg heldur ikki at geva honum nakað viðmæli, men eitt mótmæli og ávaring um ikki at stuðla slíkum fúlum, pedofilum og svínskum lesnaði á føroyskum, skrivar Ólavur í Beiti.

### Ússaligt

Yrkjarin Agnar Artúvertin heldur tað hinvegin vera órímiligt, at ummælarin grundar sína niðurstøðu á einstøk, leysrivin brot í savninum.

- Tað, at Ólavur í Beiti tekur eina reglu úr mínum yrkingasavni og brúkar hana móti mínum persóni, er sera ússaligur framferðarháttur, tá ein ætlar at sorla ein annan niður, skrivar harmi yrkjarin.

»Jahve kemur aftur - úr døprum tonkum og svørtum vónloysi« er 50 blaðsíður og er at fáa í bókhandlum kring landið. Tað er forlagið Gwendalyn, sum gevur út.

Savnið hevur yrkjarin ognað løgmanni.

# Gamal Waagstein málningur funnin í bingju

**Ein gamal Waagstein málningur varð nú um dagarnar funnin í eini bingju í Klaksvík, sum kom Danmark. Málningurin verður nú seldur á uppboðssølu**

FUNNIÐ
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Enn veit ongin við vissu, hvussu hesin málingurin eftir listamannin J. Waagstein er endaður í eini bingju, sum Danmissión hevur sent til Klaksvíkar*

Tey gjørdust ikki sørt bilsin í handlinum Gamal og Nýtt í Klaksvík, tá tey nú ein dagin funnu ein gamlan Waagstein málning í eini bingju, sum kom úr Danmark

Málningurin eftir kenda listamannin Jógvan Waagstein er frá 1937, og kom hann undan kavi í eini bingju, sum Danmissión hevði sent handlinum Gamalt og Nýtt í Klaksvík, veit heimasíðan hjá Norðlýsinum at siga.

### Undangongumaður

Hvussu málningurin eftir Waagstein er komin í bingjuna, vita tey í handlinum ikki, men tey vísa á, at Danmissión ofta tømir íbúðir og sethús eftir deyðsbúgv, og helst er hesin málningurin á henda hátt endaður í Klaksvík.

Málningurin, sum er 69x40 sentimetrar við rammu, sýnir royndarstøðina í Hoyvík, har Fornminnissavnið er nú, við Glyvursnesi í baksýni.

Jógvan Waagstein (1879-1949) var ein av undangongumonnunum í føroyskari myndlist. Ofta bera hansara málningar brá av franskari impressionismu, har málarin fer út í náttúruna at leita upp vøkur útsýni. Við málningum eftir Waagstein og hansara nýskapandi javnaldrum, sóðu føroyingar á fyrsta sinni listarligar lýsingar av sínum egna landslag, sum gjørdist megintema í føroyskari myndlist í 20. øld.

### Á uppboðssølu

Norðlýsið boðar frá, at um onkur hevur hug at geva eitt boð uppá málningin, so ber til at støkka inn á gólvið í Gamalt og Nýtt, har málningurin verður sýndur fram.

Eisini ber til at senda eitt boð yvir teldupostin til Norðlýsið, sum síðani verður sent víðari til Gamalt og Nýtt.

Teldupostadressan er nordpres@olivant.fo

Minstaboð er 16.000 krónur

# Heiðurskonsert fyri Hugh Watkins

**7. mai verður heiðurskonsert fyri bretska Hugh Watkins, sum undirvísti í tónleiki í Føroyum í 70'unum og nú vitjar aftur**

KONSERT
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

**Nú skjótt 30 ár síðani hann fór úr Føroyum, vitjar eldhugaði bretski tónleikarin Hugh Watkins aftur. Uttan iva vekir vitjanin minnir hjá mongum, sum nú eisini fáa høvi at heiðra ensku hornhetjuna.**

### Vakti áhuga

**Hugh Watkins kom seinast í 70'unum til eitt 3 mánaðar vikariat í Klaksvík at taka sær av Klaksvíkar Hornorkestri, tí orkesturleiðari teirra var burturstaddur hettar tíðarskeiðið.**

**Tá summarið kom og teir 3 mánaðarnir vóru farnir, flutti Hugh til Havnar.**

**Hann tók upp samband við Tórshavnar Kommunuskúla og Eysturskúlan og bjóðaði seg fram at undirvísa í blásiljóðførum. Hann vakti skjótt tónleikaáhugan hjá børnunum, og skjótt vóru skúlaorkestur á báðum skúlunum. Fleiri av teimum sum byrjaðu at spæla hjá Hugh Watkins spæla enn, bæði sum yrkistónleikarar og áhugatónleikarar, fleiri starvast eisini í dag sum tónleikalærarar í Føroya Musikkskúla.**

**Umframt at arbeiða í skúlum hevði hann eisini virknan leiklut í orkestrunum í býnum, Harmoniorkstrinum GHM og Havnar Hornorkestri. Har arbeiddi hann serliga við at fáa ungdóms orkestur settan á stovn, so tilgongdin til vaksnu orkestrini skuldi verða so góð sum gjørligt. Seinni fór hann leiðina til Suðuroyar og var við til at stovnað Tvøroyrar Hornorkestur í 1978.**

### Týdning fyri tónleikalívið

**Hugh Watkins var sera ágrýtin tónleikalærari, hann undirvísti í øllum blásiljóðførum og fekk eina rúgva av børnum og ungum at spæla. Hettar sást eisini aftur í orkestrunum, tí tey mentu seg nógv og talið av spælararum øktist munandi.**

**Seinast í 70'unum var eingin skipað tónleikafrálæra, so tað hevði stóran týdning fyri tónleikalívið at ein maður við dirvi og orku sum fáur, fór í gongd við hettar arbeiðið.**

**Enn tann dag í dag eru nógv fólk í Føroyum sum minnast henda gávuríka og ídna mannin, og er tað tí sera forvitnisligt hjá mongum at fáa vitjan av honum, nú skjótt 30 ár eftir at hann fór úr Føroyum.**

**Í sambandi við vitjanina verður heiðurskonsert fyri Hugh Watkins hósdagin 7.mai kl. 20:00 í Læraraskúlahøllini.**



*Mong minnast uttan iva ídna tónleikalæraran Hugh Watkins, sum nú vitjar aftur í Føroyum*